# MASKINMEISTARIN

Nr. 16 / Mars 2022



# Maskinan førdi hann fyrst út í heim

## - síðan út á útoyggj í Føroyum



**Skal vera pallur hjá føroysku sjóvinnuni**



**John gevst – aðrir bjóða seg fram**



**14 meistarar fingu prógv**

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
Vanliga eru fýra útgávur um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Tummas Eli Høj Joensen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda Maskinmeistaran, kunnu boða frá hesum í telduposti til:
press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið;

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt.
MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
Petur Skeel Dahl: Privatmynd
Ólavur í Geil: Blue Faroe Islands
John Højsted: Ingolf S. Olsen
Próvtøka: Maria Lava Jacobsen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
502022

**Prent og liðugtgerð**
Føroyaprent
info@foroyaprent.fo
314555

Upplag: 800

# INNIHALD

Oddagrein....3
Maskinan førdi hann út í heim....4
Skal vera pallur hjá føroysku sjóvinnuni....12
Bæði fyrimunir og vansar at samráðast hvør sær....14
Samráðingar tað mesta av árinum....16
14 meistarar fingu prógv....18
Formaðurin brúkti søguna at lýsa fakið....20
John gevst – aðrir bjóða seg fram....22
Tíðindi....26
Føðingardagar....27

# Gerandisdagurin komin afturíaftur



So upprann loksins dagurin, tá vit eftir tvey møtimikil ár við koronu og øllum teimum tvørleikunum, ið fylgdu við, kundu siga farsóttini farvæl.

Eg veit væl, at tit eins og aðrir starvsbólkar hava toygt tykkum í hvørjari lykkju fyri í mest møguligan mun at minka árinini á tær nógvu sera týdningarmiklu samfelagsfunksjónirnar, sum maskinmeistarar hava ábyrgdina av. Eisini hava nógv tykkara verið ígjøgnum langar og strævnar útmynstringar við sóttarhaldum og truplari ferðing fyri at røkja tykkara størv á sjónum. I fiskivinnuni hava tit, hóast prísirnir blivu trýstir niður av farsóttini, ikki hildi tykkum aftur, men lagt til brots við sama eldhuga, sum altíð hevur eyðkent okkara fiskifólk, øllum semfelagnum at gagni.

Alt hetta hava tit øll somul uppiborið stórt rós fyri.

Í ár ber eisini til aftur at halda ein vanligan aðalfund, og nú hann er á gáttini, vil eg gera vart við nøkur viðurskifti.

Tað er nú einaferð soleiðis, at tað er aðalfundurin, sum er hægsti myndugleiki felagsins, og um tú vilt hava broytingar í lógum felagsins, í ásetani av limagjaldinum, ella okkurt heilt triðja, ja, so má tað gerast við at møta upp á aðalfundinum og møguliga leggja fram uppskot um broytingar til aðalfundin at taka støðu til. Tí tað eru bert virknir limir, sum møta á aðalfundinum, ið kunnu gera av, um eitt uppskot vinnur frama ella ikki.

Eg fái javnan spurningar um ymisk grundleggjandi viðurskifti kring felagið, um hví ymiskt er, sum tað er. Eitt nú hví aðalfundurin ikki liggur millum jóla og nýggjárs sum hjá hinum manningarfeløgunum, tí tað hevði bøtt um møguleikarnar hjá siglandi limunum at luttaka og vera við til at ávirka nevndarsamanseting og felags- og limaviðurskifti annars. Til tað er at siga, at í lógum felagsins er tað ásett, at fundurin skal vera í fyrsta ársfjórðingi.

Tað at fáa aðalfundin fluttan, so hann liggur høgligari fyri sjófólkið, er eitt dømi um eitt uppskot, sum hevði verið upplagt at lagt fram til aðalfundin at tikið støðu til.

Eg sigi hetta bara, tí í mínum heimi er tað sera umráðandi, at limirnir sjálvir ávirka, har teir kunnu, fyri tann vegin at fáa felagið at vera til so stórt gagn sum gjørligt fyri allan limaskaran.

Á aðalfundinum í ár, sum verður á Parnassinum á Hotel Hafnia leygardagin 19. mars, er millum annað nevndarval á skránni, og hesa ferð er talan um stríðsval til teir báðar nevndarsessinar, sum standa fyri vali. John Højsted tekur ikki við afturvali til sín sess, men umframt Jóhan Mørkøre, sum tekur við afturvali, stilla í hvussu er tveir aðrir limir upp, Ólavur J. Østerø og Rógvi K. Hansen, til teir báðar sessirnar.

Og hvør veit, kanska onkur av hinum aðalfundarluttakarunum eisini fara at halda seg framat.

Nú er langt síðan, at tað hevur borið til at verið sosial og havt nakran veruligan hugna í samband við aðlafundin. Tí møguleikanum hevur korona sjálvandi forkomið, men tað verður afturlønt hesa ferð, tí eftir formliga aðalfundin bjóðar felagið døgurða, har borðreitt verður við øllum góðum, og Sámal Ravnsfjall og Elisa Vang fara at undirhalda við ávikavist sangi og skemti.

Vónandi møta tit fjølment, soleiðis at vit fá ein góðan, viðkomandi og hugnaligan aðalfund.



***Ólavur Gunnarsson***
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*



**Navn:**
Petur Skeel Dahl

**Føddur:**
3. januar 1976

**Uppvaksin:**
Føddur og uppvaksin í Hoyvík

**Bústaður:**
Hoyvík

**Útbúgving:**
Rør og blikksmiður og maskinmeistari

**Hjúnastøða:**
Giftur við Mariu

**Børn:**
Petur 23 ár, Oddvør 18 ár, og Anita 14 ár

*Petur Skeel Dahl til arbeiðis*

# Maskinan førdi hann fyrst út í heim

## - síðan út á útoyggj í Føroyum

**Hann er hoyvíkingur út í odd og egg, og her er hann bæði føddur, uppvaksin og hevur sett búgv. Men arbeiði hansara hevur verið umborð á skipum úti í heimi. Í dag arbeiðir hann sum rakstrarleiðari á virki á útoyggj – í Føroyum.**

Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Petur Skeel Dahl hevur í uppvøkstri sínum sæð, hvussu Hoyvíkin er eksploderað, sum hann tekur til. Hon var ein lítil bygd, tað fyrsta hann minnist, og í dag er Hoyvíkin ein lítil býur.

– Tá høvdu vit ein lítlan sjey-sporaðan skúla í Hoyvík, í dag eru tveir velduga stórir skúlar har, so tað er stórur munur. Eg havi altíð verið virkin í H71, og tá eg byrjaði at spæla sum smádrongur, tá var tað eitt felag uttan venjarar meira ella minni, og vit kláraðu okkum mest sum sjálvi. Í dag er felagið stórt og er kent úti í heimi. Tað er eisini ein spegilsmynd av, hvussu nógv Hoyvíkin er vaksin, heldur hann.

– Tá vit sum smábørn fóru langt niðan í hagan, so gingu vit kanska niðan á Mylnutjørn. Onkuntíð fóru vit eitt sindur longri, og tað var øðiliga langt. Í dag búgva vit omanfyri ovara útferðarplássið hjá okkum, og tað sigur eisini eitt sindur um broytingarnar í økinum, eg vaks upp í, sigur Petur Skeel Dahl.

Í Hoyvík er eisini komin Hoyvíkar kirkja og fleiri samkomur, millum annað Lívdin og Oasan.

Ert tú uppvaksin í Hoyvík, so ert tú hoyvíkingur, men fleiri teirra, sum í dag búsetast í Hoyvík, kalla seg havnarfólk, og tað dámar ikki hoyvíkingum.

– Nei, tá plaga vit at siga við tey, at tey eru ikki havnarfólk, tey eru hoyvíkingar. Men eitt sindur løgið er tað, tí børnini hjá teimum, sum kalla seg havnarfólk, tey kalla seg hoyvíkingar, flennir Petur Skeel Dahl.

### Í læru hjá Demich

Tá Petur var liðugur í 7. flokki, flutti hann við øðrum hoyvíksbørnum oman í Eysturskúlan í 8. flokk. Tað dámdi honum væl. Har komu tey at ganga saman við nógv fleiri næmingum, og tey komu at kenna nógv nýggj andlit. Og hetta var gevandi.

Í 1992, tá fíggjarkreppan var upp á tað hægsta, varð Petur Skeel Dahl liðugur í 10. flokki. Hin 6. oktober hetta árið fór Sjóvinnubankin av knóranum, og hetta vóru ringar tíðir hjá nógvum føroyskum familjum. Tað var heldur ikki sum at siga tað at fáa arbeiði ella lærupláss, men her var Petur heppin. Hann slapp í læru sum rør- og blikksmiður hjá Demich. Og her vórðu í grundini lunnarnir lagdir undir maskinmeistaraútbúgvingina, sum kom seinni.

– Tíðirnar vóru so ringar. Til dømis 1992, 1993 og 1994, tað var so ómetaliga lítið at gera. Vit vóru nakrir lærlingar, sum gingu har saman við nøkrum sveinum, og teir tóku alt arbeiði upp á seg, sum teir kundu fáa. Tað hevði so aftur við sær, at vit sluppu at royna okkum í øllum millum himmal og jørð, sigur hann.

Hann var millum annað í fleiri mánaðir og legði stál á gólvið í kuplunum á Sornfelli. Hann var eisini nógv á Landssjúkrahúsinum og bjálvaði ven-tilasjónsrásir. Onkuntíð var hann við til at seta vindeygu í onkran bygning.

– Tað vóru Símun Hansen og Tryggvi Guttesen, sum áttu Demich tá. Símun Hansen var á verkstaðnum, og hevði við okkum at gera. Har lærdi eg disiplin, at tú møtir klokkan 8.00 til dømis. Eg veit ikki, um eg kann siga, at Símun fekk meg til fólk, men eg havi í hvussu er ógvuliga stóra virðing fyri honum og fyri tað, sum hann stóð fyri. Eg havi stóra virðing fyri fólki, sum kempa fyri nøkrum, ikki minst, tá harðast stendur á, sigur Petur Skeel Dahl.

Til jólar í 1997 var hann útlærdur hjá Demich, og tá var nógv smiðjuarbeiði, rørarbeiði og blikkarbeiði gjørt. Nú arbeiddi hann eitt ár sum sveinur.



*Petur sigldi í umleið átta ár við Olympic Intervention*

*Mynd: Privatmynd*

## Á maskinskúla

Í 1998 fór Petur Skeel Dahl á fyrireikingarskeið til maskinmeistaraútbúgvingina, og síðan fór hann á maskinskúla.

– Eitt var at megna fyrireikingarskeiðið, men tá eg byrjaði á Maskinskúlanum, tá fekk eg ein ordans kjaftfisk, flennir hann.

Hann hevði ongantíð verið til skips, men tá hann arbeiddi hjá Demich, arbeiddu teir nógv umborð á skipum. Eldri beiggi hansara var maskinmeistari, so tað ávirkaði eitt sindur, og so var Maskinskúlin í Føroyum. Alt hetta samanlagt gjørdi, at Petur valdi at fara maskinvegin.

Eftir fyrsta árið tók hann maskinistprógv, og sama summarið fekk hann arbeiði sum frítíðaravloysara-maskinistur við Ternuni, sum tá sigldi um Vestmannasund. Og øll árini, meðan hann gekk á maskinskúla, varð hann biðin sum avloysari við Ternuni, bæði í ymsum ferium, vikuskiftum og so framvegis. So hann hevði nærum siglingstíð, tá hann fekk maskinmeistaraprógvið.

– Eg hevði ongantíð arbeitt upp á motorar, men tað gjørdu vit við Ternuni, so har lærdi eg eisini nakað, sigur Petur Skeel Dahl.

Til jólar í 2000 fekk Petur maskinmeistaraprógvið.

## Veruliga til skips

Longu fyrst í januar 2001 fór Petur til skips. Hann fekk kjans við Sólborg, sum fiskaði rækjur í Eysturgrønlandi. Hetta metir hann sum sín fyrsta veruliga túr til skips. Veðrið var vánaligt, tá teir fóru úr Íslandi og stevndu móti Eysturgrønlandi, og tá teir komu til Eysturgrønlands var himmalsins ódnarveður, so teir lógu bakk í 14 dagar.

– Eg haldi, at eg spýði í 10 dagar, og tá hugsaði eg við mær sjálvum, at hetta var tað, hetta var mín karriera á sjónum. Men so batnaði veðrið, og eftir stuttari tíð høvdu vit fiskað alla kvotuna, greiðir Petur frá.

Tá hann kom heim, komu pengarnir á kontuna, og so var hann til reiðar at fara avstað aftur beinanvegin. Næsta túrin fóru teir á Flemish Cap, og tá var Petur triðimeistari.

## Við grønlendskum krabbaskipi

Afturkomin av Flemish Cap fekk hann í boði at fara við einum grønlendskum krabbaskipi. Onkur hevði givið avboð,

og nú fekk hann møguleikan. Hann tók av, og fór yvir til Grønlands saman við Leivi í Buð í Hvannasundi, sum var skipari á hesum krabbaskipinum.

Teir komu umborð á skipið í Sisimiut og skuldu so sigla til Nanortalik. Men í Nanortalik sluppu teir ikki inn fyri ísi og sigldu tískil upp til Nuuk, og har fór gamla manningin av. Krabbaskipið var ein gamal 40 metrar langur nótabátur, og teir royndu eftir snjókrabba.

Grønlendingar høvdu eitt slag av einum krabbaævintýri seinast í 1990-unum og eitt sindur inn í hesa øldina, so hendan túrin fingu teir um endan á krabbaævintýrinum, sum í grundini ikki var nakað ævintýr, tí teir fingu einki. Eingir krabbabátar fingu nakað tá.

– Tað var ein uppliving at vera við hesum gamla bátinum við Callesen-motori – einsamallur. Men Leivur í Buð var mær hollur, eg var ungur og grønur, men hann var gamal í garði. Og vit komu livandi frá túrinum, hóast nakrar trupulleikar. Vit høvdu Cummins ljósmotorar við ongari alarmskipan, eingin separatorur var til oljuna, filtrini vóru vánalig, so onkuntíð svav eg í maskinrúminum. Vit fiskaðu uttanfyri Sisimiut, og tvær ferður vóru vit niðri í Nanortalik, og eg má siga, at Grønland er eitt heilt fantastiskt land, sigur hann.

Tríggjar mánaðar vardi hesin túrurin.

– Tað vóru nakrir læruríkir mánaðir, heldur hann.



### Aftur til Demich

Tá Petur Skeel Dahl kom heim aftur úr Grønlandi, fór hann aftur at sigla hjá Strandferðsluni í nakrar mánaðir. Síðan fekk hann enn eina ferð kjans at fara til Eysturgrønlands at fiska rækjur við Sólborg. Ein túr á Flemish Cap fóru teir eisini hesaferð.

Tá hann kom heim aftur, søkti hann hýru hjá Mærsk, og hann varð eisini biðin at koma til samrøðu. Men hann og konan skuldu hava barn nummar tvey um hetta mundið. Ein dagin fer hann eini ørindil til Demich, og tá verður hann spurdur, um hann kann koma í starv sum formaður á verkstaðin hjá teimum. Nýggi Føroya Tele-bygningurin skuldi byggjast tá, og Demich hevði fingið arbeiðið. Tað hevði við sær, at formaðurin á verkstaðnum skuldi standa fyri arbeiðnum hjá Demich í nýggja Føroya Tele-bygninginum. Tað snúði seg um eitt ár, men hann varð har í trý ár. So hann gav avboð til Mærsk.

– Hetta var altso, tá Føroya Tele-bygningurin varð bygdur. Tað var ein ógvuliga stór ætlan, og nærum øll tann føroyska byggivinnan var ávirkað av tí arbeiðinum so ella so. Nógv samstørv vórðu gjørd. Hetta var ein veldug ætlan, sum kostaði 110 milliónir krónur. Tað er ikki meira, enn ein kiosk kostar í dag, heldur Petur Skeel Dahl.

Aftaná trý ár fór hann til Noregs at arbeiða á Orminum Langa, sum var eitt oljureinsiverk uttan fyri Molde.

***Honum dámdi væl at sigla við Subsea-skipum***

*Mynd: Privatmynd*




*Umborð á Olympic Intervention*

*Mynd: Privatmynd*

## Í frálandsvinnuna

Seint í 2007 fær Petur kjans við einum norskum frálandsskipi hjá Olympic Shipping. Hetta var nakað, hann hevði hugsað um í eina tíð, so tað passaði honum væl, tá tilboðið kom. Her gjørdist hann fyrstimeistari við veitingarskipinum Supply Progress. Hann lá niðri í Great Yarmouth tá. Hetta var ein heilt nýggjur heimur hjá Peturi.

– Ja, hetta var alt fullkomiliga nýtt fyri meg. Sjálvandi visti eg, hvar motorurin var, men hvat eitt útgerðarskip ella ein supply-bátur var, tað ánaði eg ikki. Vit vóru bara tveir maskinmeistarar, maskinstjórin og eg. Vit gingu seks og seks, og tað var væntað av tær, at tú dugdi tingini. Eg má siga, at tá kendi eg meg fullkomiliga "lost". Men eg veit, at nógvir aðrir hava roynt tað sama, og tá til stykkis kom, gekk tað bara væl, sigur Petur.

Fyrstu tíðina arbeiddu teir nakað uttan fyri Great Yarmouth, og seinni fóru teir til Abukir, sum er ein havnarbýur tætt við Alexandria í Egyptalandi. Hetta er ein havn hjá egyptisku sjóverjuni, men sum eisini verður nýtt sum oljuhavn. Teir vóru nakrar túrar í Abukir, og tað var eisini ein uppliving hjá Peturi at koma til Afrika.



*Petur Skeel Dahl greiðir Hovgrími G. Magnussen frá arbeiðinum á rognkelsistøðini*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*



*Verkstaðurin umborð á einum av skipunum, Petur Skeel Dahl, var við*

*Mynd: Privatmynd*

– Fyrsta túrin, vit fóru til Egyptalands, komu vit til Abukir jólaaftan, og tá fór kompressarin til luftreinsingarskipanina. Tað vóru eini 25 til 30 hitastig, so jólini fóru, við at fáa tað í lagi aftur. Eg minnist, at kokkurin hevði gjørt jóladøgurða, men eingin át, tí allir arbeiddu. Tá tók eg synd í kokkinum, og vit vóru eisini eitt sindur misnøgdir, tí vit hildu, at skiparin saktans kundi havt slakkað eitt sindur av, so vit komu inn jóladag í staðin, sigur Petur Skeel Dahl.

Hann sigur, at tá tú kemur til Egyptalands, kemur ein rúgva av fólki umborð, og skipið verður mest sum rubbað. Allir skulu hava skjøl undirskrivað, men fyri at avgreiða skjølini skulu teir hava sigarettir og annað mangt. Soleiðis er tað bara.

## Umborð á nýtt skip

Nógv skip vórðu smíðað um hetta mundið, og um summarið 2008 fekk Petur í boði at koma umborð á eittt spildurnýtt skip, sum varð smíðað á skipasmiðjuni í Ulsteinsvik. Hetta var Olympic Intervention. Tað var ein SubSea-bátur, sum millum annað ger undirvatnsarbeiði.

Olympic Intervention fór í arbeiði í USA – nakað uttan fyri New Orleans. Petur sigldi við hesum bátinum í eini átta ár, fyrst sum fyrstimeistari og seinni sum maskinstjóri.

– Tað varð arbeitt øðiliga nógv, og tað var eisini ein øðilig ferð á alla tíðina. Inn og út úr havnum á tremur við alskyns útgerð til oljuvinnuna á botni, brunnstimulering, kaðalarbeiði og so framvegis. Soleiðis koyrdi tað við fullari ferð. So inn at koyra útgerðina í land og nýggja útgerð umborð, og so útaftur. Soleiðis gekk tað heilt til 2016, greiðir Petur Skeel Dahl frá.

Eini hundrað fólk vóru við, nógvir amerikanarar, og Petur var hugtikin av, hvussu væl amerikanararnir løgdu alt til rættis. Honum dámdi sum heild væl hetta arbeiði.

Eitt skifti hevði Petur eftirlit við einum nýbygningi, sum var smíðaður á Myklebust í Noregi. Tað er sama skipasmiðjan, sum Brimil varð smíðaður á. Her var arbeiðið hjá Peturi at hava eftirlit við, at alt varð gjørt sambært tekningum og øðrum viðtøkum, at fáa deilir umborð og byggja upp eina viðlíkahaldsskipan.

Eitt stutt skifti var hann við einum útgerðarskipi í Norðsjónum, men hann treivst ikki. Millum annað er tað so ómetaliga nógv rull í Norðsjónum. So hann endaði aftur í USA.

- Mær dámdi betur tað arbeiðið, eg helt tað vera so spennandi og stundum imponerandi. Vit høvdu ein 150 tons krana, og vit arbeiddu niðri á 3.000




*Rakstrarleiðarin, Petur Skeel Dahl, og eitt av starvsfólkunum, Petur Takamasa Asano, á starvsstovuni á Rognkelsistøðini*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

metrum. So høvdu vit robottar, sum arbeiða niðri á botni, og tað eru RV-pilotar, sum passa robottarnar – sum loysa ymiskt og skrúva annað saman heilt niðri á 3.000 metrum, tað er imponerandi.

Í 2016 kom oljukreppan, og tá gjørdist púra stilt. Báturin lá har til 2017, men tá varð hann sigldur aftur til Evropa.

Í Evropa skuldu teir arbeiða í sambandi við havvindmyllur. Teir skuldu rudda fyri myllunum, og í tí arbeiðnum funnu teir bæði minur og flúgvarar frá seinna veraldarbardaga.

Næstu árini var hann við ymiskum skipum hjá reiðarínum, og í 2020, tá koronufarsóttin byrjaði, fór hann við Olympic Orion, sum lá í Trinidad. Olymic Orion er eitt sonevnt hotell-skip, sum siglir út til ymsar pallar við fólki, og við einum serligum armi, sum verður festur í pallin, kunnu fólk so ganga. Tey vóru 12 tímar til arbeiðis og 12 tímar umborð.

Áðrenn Petur slapp til Trinidad, noydd-ist hann at sita 14 dagar í sóttarhaldi í Amsterdam. Og Trinidad hevði steðgað allari fastari rutuflúgving, so reiðaríið leigaði flogfar annanhvønn mánað at flúgva beinleiðis út Amsterdam til Trinidad.

## Fer at hugsa um at koma heim

Í eina tíð hevði Petur Skeel Dahl hugsað um at koma í land. Hann ætlaði ikki at gerast gamal umborð á skipi. Ein onnur hugsan, hann hevði, var, at tað at nýta sløk 15 ár, altso alla



sína tíð og alla sína orku og alla sína arbeiðsvitan upp á eitt skip hjá einum norskum reiðara, tað tyktist eittt sindur meiningsleyst. Til dømis var eg í nógv ár við hasum eina skipinum, og eg kendi tað út og inn, og brádliga varð tað selt. Eg kenni tað, sum at tað gevur ikki heilt meining. So seinastu árini havi eg hugsað, at kanska skuldi eg farið at siglt við einum føroyskum skipi ella farið í land. Tað, sum eg meini, er, at tað var kanska betri at givið einum føroyskum reiðara ella føroyska samfelagnum mína arbeiðsorku- og vitan, sigur Petur Skeel Dahl.

**Til Svínoyar**

Eftir at hava sæð eina lýsing eftir fólki til Rognkelsistøðina í Svínoy, og eftir at hava verið út í Svínoy og tosað við spennandi og órædda stjóran, Sjúrð Jacobsen, raknaði áhugin av álvara fyri arbeiðnum á Rognkelsistøðini.

– Tá eg sá støðina, hugsaði eg við mær sjálvum, at hetta verður tað, hetta skal eg royna. Her høvdu vit ein mann, sum hevur sagt eitt gott starv frá sær á einum stórum grønlendskum trolara fyri at byggja nakað spildurnýtt og spennandi upp. Haraftrat hevur hann nøkur góð fólk aftrat sær. Og so er hetta ikki nakað átta til fýra arbeiði, og tað dámar mær væl. Nei, hetta kundi eg ikki lata fara, sigur Petur Skeel Dahl.

Í dag er Petur virkisleiðari á Rognkelsistøðini í Svínoy.



*Rakstrarleiðarin á Rognkelsistøðini í Svínoy, Petur Skeel Dahl*

# Ein pallur hjá føroysku sjóvinnuni

**Blue Faroe Islands er eitt lutfalsliga nýtt felag, sum vil vera jaligt, upplyftandi og kunnandi fyri føroysku sjóvinnuna. Tað sigur stjórin í felagnum, Ólavur í Geil. Maskinmeistarafelagið stuðlar Blue Faroe Islands**

Tekstur: Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS
Myndir: Blue Faroe Islands

Seinastu tíðina hava vit við jøvnum millumbilum sæð sjónvarpssamrøður á millum annað facebook, sum Ólavur í Geil, stjóri í Blue Faroe Islands, hevur gjørt. Samrøðurnar eru gjørdar við ymisk umboð fyri føroysk sjóvinnuna.

Júst hetta við sjónvarpssamrøðum eru lunnarnir undir fyritøkuni. Umframt samrøðurnar skriva tey onkra grein, haraftrat brúka tey Teyggjuna og hava leinkjur til aðrar greinar.

Á heimasíðuni verður millum annað sagt, at "...endamálið við BFI (Blue Faroe Island) er at kunna um mál, ið hoyra sjóvinnuni til. Blue Faroe Island gevur aktørunum ein beinleiðis pall at deila og finna kunning, sum er relevant fyri vinnuna í Føroyum. Blue Faroe Islands varpar ljós á útbúgvingar, skeið, størv og feløg innan sjóvinnuna. Vit knýta aktørar saman gjøgnum átakið við tiltøkum, so sum Sjóvinnuforum og á netinum."

Spurdur um, hvussu tú verður eitt jaligt og upplyftandi málgagn, sigur Ólavur í Geil:

– Vit hava ikki kritiskan journalistikk, vit fara ikki at sneyta í nøkrum, og øll sleppa framat. Tað verður ikki okkara uppgáva at sneyta í ymiskum viðurskiftum. Vit vilja fegin vísa á breiddina í sjóvinnuni, og hvat



*Ólavur í Geil, stjóri*

sjóvinnan hevur at bjóða, sigur Ólavur í Geil.

## Lítið gjørt við shipping

Hóast tey ikki ætla at gera kritiskan journalistikk í Blue Faroe Islands, so eru onkur viðurskifti, tey undrast á.

– Til dømis undrar tað okkum, at tað almenna vísir so lítlan áhuga fyri shipping-vinnuni. Her eru ógvuliga stórir møguleikar, men hon sær ikki út at hava nakran politiskan áhuga. Á einum Sjóvinnuforumi í 2020 var ein varin meting hjá Hans Ellefsen, búskaparfrøðingi og PhD á Fróðskaparsetri Føroya, at triðstørsta vinnan í Føroyum er shippingvinnan. Tí kann tað undra, at almennu myndugleikarnir ongan áhuga vísa fyri hesi vinnu, sigur Ólavur í Geil.

Í løtuni er evnið eisini shipping, sum BFI koyir við á heimasíðuni. Her verður hugt at avbjóðingum hjá vinnuni, útbúgvingum og útbúgvingarmøguleikum og líknandi. Hann vísir á, at vit í Føroyum ikki hava so mikið sum eina shippingútbúgving.

– Og so halda vit, at almenna pappírsveldið er ov stórt. Vit mugu hava færri samfelagsfrøðingar og færri búskaparfrøðingar í allmennu fyrisitingini. Tað er nógv størri tørvur á teimum í privatu vinnuni, tí tað er tørvur á teimum, tað er ikki har, vit eru, sigur Ólavur í Geil.

Eitt evnið, BFI ætlar sær undir nakað skjótt, er umstillingin hjá skipaflotanum til grøna orku.

## Stórur áhugi

At reka eina heimasíðu og eitt felag sum Blue Faroe Islands kostar pening. Higartil eru tað føroysk feløg, sum hava stuðlað við peningi, og lýsingar fíggja eisini ein part. Men nú byrjar áhugin eisini at koma úr útlondum. Onkur fyrispurningur er komin úr Bretlandi, um tað ikki er ein møguleiki at skriva heimasíðuna á enskum eisini.

– Og áhugin fyri at lýsa hjá okkum veksur, bæði her heima í Føroyum og uttanlands, sigur Ólavur í Geil, stjóri á Blue Faroe Islands.



*Michael Shemesh, samskipari*



*Eva Andresen, samskipari*

# Formaðurin:

# Bæði fyrimunir og vansar at samráðast hvør sær

**Um alt verður í sjálvdrátti, kann tað elva til eitt keðiligt klima umborð á skipunum, heldur Ólavur Gunnarsson, nú tað er greitt, at tey trý manningarfeløgini fara at samráðast hvør sær um sáttmálan fyri fiskiskipini. Krøvini eru handað**



*– Nú hava vit so tríggjar ymiskar samráðingar, sum allar kunnu enda úrslitaleysar. Tá kunnu vit so fáa tríggjar ymiskar semingsroyndir og í ringasta føri eisini trý ymisk verkføll. Tað er ongin stuttlig støða hjá manningarfeløgunum, men eg kann ímynda mær, at støðan er serliga trupul fyri Reiðarafelagið, sum er sáttmálamótpartur, sigur Ólavur Gunnarsson*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

Ingolf S. Olsen – PRESS

Tað verða serstakar samráðingar, sum í næstum byrja ímillum Maskinmeistarafelagið og Føroya Reiðarafelag um fiskiskipaflotan.

Ofta hava tey trý manningarfeløgini samráðst saman, í hvussu er um felagsreglurnar í sáttmálanum.

Men soleiðis er ikki hesa ferð. Feløgini skulu samráðast hvørt sær.

### Felags ábyrgd

Øll trý hava hvørt í sínum lagi sagt galdandi sáttmála upp at fara úr gildi 1. april, og 3. mars handaði nevndin í Maskinmeistarafelagnum Føroya Reiðarafelag síni krøv til nýggja sáttmálan.

– Vit eru ikki teir, ið hava gjørt av, at samráðingarnar hesa ferð skulu vera púrasta hvør sær. Tað er hent fyrr, men onkursvegna haldi eg, at øll feløgini hava eina ábyrgd fyri, at alt ikki verður gjørt í sjálvdrátti, men at roynt verður at samskipa okkurt, serliga tá tað snýr seg um felagsreglurnar.

– Í hvussu er, haldi eg, at ansast má eftir, at tað ikki fer at snúgva seg um, at

tey trý feløgini hvørt í sínum lagi fara eftir at vinna sær sømdir upp á rokningina hjá hinum feløgunum. Tí hendir tað, kann tað lættliga elva til eitt kaldligt klima ikki bara ímillum sjálv feløgini, men eisini ímillum teirra limir umborð á skipunum, sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

**Eisini fyrimunir**
Ólavur Gunnarsson leggur tó dent á, Maskinmeistarafelagið kennir seg væl brynjað til samráðingarnar og tískil ikki ræðist íkomnu støðuna.

– Vit fara til samráðingarnar við opnum sinni og hava als ongar trupulleikar at samráðast fyri okkum sjálv. At vit ikki eru saman, letur sjálvandi eisini upp fyri, at vit kunnu fokusera upp á nøkur mál, sum eru serlig fyri okkum, og sum helst høvdu verið trupul at tikið upp, um talan var um felags samráðingar. Nú fáa vit møguleika at rætta upp á nakrar skeivleikar í sáttmálanum, og tann møguleikan ætla vit okkum at brúka.

- Vit hava sjálvsagt í roynd og veru bara ábyrgd fyri okkara egnu limum og teirra viðurskiftum, og teir ætla vit avgjørt ikki at svíkja. Vit mugu vera sjálvsøkin í sáttmálasamráðingunum, tí ongin annar fer at hugsa um okkum, sum landið liggur, sigur hann.

**Turbulent vár**
Formaðurin  væntar tó, at serliga støðan, at feløgini samráðast hvørt sær, kann gera samráðingarnar truplar.

– Hetta kann blíva eitt turbulent vár. Sáttmálin fyri fiskiskipini er jú serstakur, har felagsreglurnar eru tær somu fyri allar limirnar í teimum trimum manningarfeløgunum, og so hava vit serstakar ásetingar fyri maskinmeistarar, navigatørar og fiskimenn hvør sær. Nú hava vit so tríggjar ymiskar samráðingar, sum allar kunnu enda úrslitaleysar. Tá kunnu vit so fáa tríggjar ymiskar semingsroyndir og í ringasta føri eisini trý ymisk verkføll.

– Okkara støða er, sum hon nú einaferð er, men eg kann ímynda mær, at støðan er serliga trupul fyri Reiðarafelagið, sum er sáttmálamótpartur, sigur Ólavur Gunnarsson.

- Nú ljóðar tað kanska, sum at tað er so serstakt, at samráðingarnar um sáttmálan fyri fiskiskipaflotan eru so truplar og orkukrevjandi. Men tað er onki nýtt í tí. Maskinmeistarafelagið verður ofta skýrt bara at vera til fyri tey alment settu á landi, men sannleikin er, at rættiliga stórur partur av orkuni verður brúkur upp á maritim viðurskifti og teir maritimu sáttmálarnar, ikki minst sáttmálan fyri fiskiskipini, leggur hann afturat.

**Eftirlønin skal upp**
Ítøkiligu krøvini til sáttmálasamráðingarnar eru handað, men sum siðvenja er, vil formaðurin í virðing fyri mótpartinum ikki fara í smálutir um ítøkiliga innihaldið í krøvunum.

Men hann hevur onki ímóti at nema eitt sindur við tær stóru linjurnar.

- Krøvini renna jú ikki upp úr ongum sama dag, tey skulu handast mótpartinum. Nógv evni eru afturvendandi, og tess longri, tey hava staðið á skrá, tess meira átrokandi verður tað at fáa tey loyst. Tað er til dømis onki dulsmál, at eftirlønin hjá teimum, ið starvast í fiskivinnuni á sjónum, er ein knútur, sum tað í áratíggju ikki hevur eydnast at loysa ella bara linka. Eftirlønin var 45 krónur um dagin í nógv ár og øktist gaman í upp í 50 krónur í semjuni í sambandi við samráðingarnar seinast. Men harragud, hatta er jú peanuts og stór skomm, um tú samanber við eftirlønarskipanir á landi. Tí vilja vit hava okkurt gjørt við eftirlønina nú, sigur Ólavur Gunnarsson.

**Onki gjøgnumskygni**
Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum vísir eisini á, at nógvu broytingarnar í fiskivinnulóggávuni í nógvum førum hava gjørt tað nærum ómøguligt hjá manningunum og teirra fakfeløgum at fylgja við í, hvat vendir upp, og hvat vendir niður í avrokningunum.

- Tað er serliga ein stórur trupulleiki, tá skip fiska kvotur fyri onnur skip. Tað er eitt stórt detektivarbeiði bara at royna at finna út av, hvør hevur fingið hvat av avreiðingarvirðinum. Har er onki gjøgnumskygni. Hesi viðurskiftini mugu og skulu fáast upp á pláss. Tað er spell, at vit skulu brúka sáttmálan og sáttmálasamráðingarnar at fáa greitt politiskt skaptar fløkjur, men tað verða vit noydd til, sigur hann.

Í hesum sambandi hevur hann eisini eitt skot til manningarnar sjálvar.

- Tilvildarliga frætta vit um eina rúgvu av fastlønarskipanum, sum vit onki vistu um. Tað er harmiligt, tí tað er knæsett í sáttmálanum, at individuellar avtalur skulu góðkennast av felagnum, sigur Ólavur Gunnarsson.

**Hýran er fult uppiborin**
Hinvegin vil hann fegin ganga á odda at fáa eina uppgerð við ein hugburð, ið hann heldur gerst alsamt meira ráðandi ímillum fólk, nevniliga at manningarnar í serliga uppsjóvarvinnuni vinna sínar pengar av órøttum.

– Tað hevur verið nógvur polemikkur um tær stóru hýrurnar har. Men tað gongur upp og niður í fiskivinnuni, og gingið verður eftir sáttmálum, har manning og reiðarí býta avreiðingarvirðið. Soleiðis hevur tað søguliga altíð verið, men tað hava bestemt ikki altíð verið stórar fortjenastur í uppsjóvarvinnuni.

- Eg vil fegin standa upp og verja okkara limir, ið eru so hepnir at vinna nógvar pengar nú, tí teir fáa onki, sum teir ikki hava sín fulla rætt til. Og teir skulu ikki hava ringa samvitsku av at taka ímóti síni løn, bara tí sáttmálarnir og gongdin í vinnuni í løtuni gagnar teimum, sigur Ólavur Gunnarsson.

# Samráðingar tað mesta av árinum



*- Sjálvandi er tað gott, at hesir hava áhugaverd maskinmeistarastørv at venda heim til, men hesi størv skulu samstundis eisini appellera til tann unga, nýútbúna maskinmeistaran, sum ikki hevur hug at velja sjóvegin – um tað ikki bara er fyri tann lønarliga partin í líkningini, sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

**Sáttmálasamráðingar fylla í stóran mun kalendaran hjá Maskinmeistarafelagnum í ár. Felagsformaðurin sigur, at tey mugu byrja, har tey sleptu seinast, tí lønarliga afturúrsiglingin er enn týdningarmesti knúturin at fáa loyst**

Ingolf S. Olsen – PRESS

2022 er eitt sáttmálaár hjá Maskinmeistarafelagnum, og mesta partin av árinum fer nógv orka at verða nýtt til sáttmálasamráðingar.

Sáttmálin fyri fiskiskip gongur út 1. apríl, krøvini eru handað, og samráðingarnar eru á gáttini – sí grein um tað aðrastaðni her á síðunum.

1. juli gongur so sáttmálin við Føroya Arbeiðsgevarafelag út. Tað er sáttmálin fyri maskinmeistarar í privatu vinnuni á landi.

## Lønartalvan sigur ósatt

Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, sigur, at tey umframt tey vanligu krøvini vilja hava sjálva lønartalvuna fyri hetta økið dagførda.

– Talan er jú um ein minimumsáttmála, men lønartalvan samsvarar ikki við veruleikan, tí nógvir meistarar fáa meira enn minstamarkið loyvir. At teir liggja oman fyri er sjálvsagt gott, men tað er als ikki gott, at lønartalvan ikki stendur mát við veruleikan, tí tað, sum er lagt oman á kann vera ódrúgt. Tú kanst siga, at tað er við arbeiðsgevarans náði, at teir fáa hasa lønina. Arbeiðsgevarin kann jú í prinsippinum altíð seta lønina niður aftur, um tað rekur eitt sindur á kíkin, bara hon ikki fer niður um minstu ásetingina. Tað elvir til ótryggleika um lønina, og tí eigur tað at vera reglan, at lønartalva og løn samsvara, sigur hann.

1. oktober ganga teir almennu sáttmálarnir við Fíggjarmálaráðið og KAF, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, út.

## Eftirbátur

Ólavur Gunnarsson dylir ikki, at hann væntar harðar samráðingar um teir almennu sáttmálarnar, tí stóri trupulleikin, sum var grundarlagið undir høvuðskrøvunum seinast, enn er eins stórur, nevniliga stóri lønarmunurin, sum er ímillum alment settar maskinmeistarar í Føroyum og teirra starvsfelagar í londunum rundan um okkum.

– Vit eru eftirbátur, so tað stendur eftir, og tað kunnu vit ikki blíva við at góðtaka. Aðrir fakbólkar í samfelagnum hava ella hava havt sama trupulleika – okkurt felag hevur enntá verið í verkfalli upp á júst henda spurningin – og trupulleikin er ikki minni hjá okkum, sigur hann.

## Seta ov lin krøv

Formaðurin ásannar, at peikifingurin í ávísan mun vendir ímóti felagnum og tess limum sjálvum, tí tað tykist vera ov lætt hjá arbeiðsgevarunum at halda fast í eitt alt ov lágt lønarlag.

Ein av orsøkunum kann vera lívsleiðin, ið nógvir føroyskir maskinmeistarar ganga, heldur formaðurin.

– Mynstrið hevur í stóran mun verið, at maskinmeistarar sigla, annaðhvørt við fiskiskipum, farmaskipum ella í frálandavinnuni, kanska ein stóra helvt ella meira av arbeiðslívinum. Tá eru teir nógv burtur og tjena ofta nógvar pengar. Ta seinastu tíðina á arbeiðsmarknaðinum, tá tey størstu privatu peningaligu tøkini í stóran mun eru tikin, húsalánini eru niðurgoldin og so fram eftir, tá hava teir ofta hug at vera heima og kanska hava eina øðrvísi tilveru við øðrum raðfestingum, har lønin ikki hevur sama týdning sum áður.

– Tí er tað ikki trupult at manna nógv maskinmeistarastørv á landi og samstundis halda lønini niðri. Sjálvandi er tað gott, at hesir hava áhugaverd maskinmeistarastørv at venda heim til, men hesi størv skulu samstundis eisini appellera til tann unga, nýútbúna maskinmeistaran, sum ikki hevur hug at velja sjóvegin – um tað ikki bara er fyri tann lønarliga partin í líkningini. Ein má hava í huga, at tað tekur sjey ár at útbúgva seg til maskinmeistara tann vanliga vegin, har handverkaraútbúgving er ein partur, og sjey og eitt hálvt ár, um farið verður tann nýggja aspirantvegin, har miðnámsprógv krevst fyri upptøku. Langa úrtbúgvingin eigur avgjørt at avspeglast í lønini í øllum maskinmeistarastørvum, sigur Ólavur Gunnarsson.










ROYN TÍNA VITAN Í VERULEIKA-KENDUM UMSTØÐUM

# TAK SKEIÐINI TÁ TÚ ERT HEIMA

## Vit hava nýggjastu tøknina og bestu umstøðurnar at læra nýtt.

Siglir tú úti ella heima er tað ómakaleyst at taka skeiðið hjá okkum. Vinnuháskúlin hevur í 130 ár útbúgvið tey bestu av teimum bestu.

## VIT BJÓÐA ØLL SKEIÐ

- BRM-skeið
- ECDIS-skeið
- GOC-skeið
- DP-skeið
- Eldsløkkingar-skeið
- SSO-skeið
- ERM-skeið
- Tecdis-skeið
- Heilsu-skeið
- ARPA-skeið
- Trygdar-skeið
- Stroppa-skeið

... og nógv onnur skeið

Finn skeiðsyvirlit og tilmelding á
**www.skeid.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

SENDISTOVAN

# 14 meistarar fingu prógv



*Sámal Ravnsfjall undirhelt við sínum væl umtóktu sangum*



*Hesir fingu prógv 21. Januar: Andri Brynjólfur Lenvig, Elias Jóhannesarson Lervig, Gunnar Krisfinnson Christiansen, Jóhan Hermann Slættalíð, Martin Unason Nón, Súni Sigmarson Davidsen, Brian Olsen, Jákup Matras, Bjarni Skála, Teitur Tollaksson og Jón í Heimistovu. Jákup Matras vantar á Myndini*

TEKSTUR: Ingolf S. Olsen, PRESS
MYNDIR: Maria Lava Jacobsen, Vinnuháskúlin

Á stóra prógvhandanardegnum 21. januar fingu 11 maskinmeistarar prógv á Vinnuháskúlanum, og 25. februar fingu tríggir maskinmeistarar síni prógv.

**Virðislønir:**
1. Martin Unason Nón, grindaknív frá SEV. 2. Andri Brynjólfur Lenvig, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum. 3. Brian Olsen, Kikara frá P/F Thor.

**Ídnisvirðisløn:**
Martin Unason Nón, lummaur frá Skansa Offshore.



*Hesir tríggir fingu prógv 25. februar: Petur Pauli Petersen, Heri Eyðunsson Kjærbo og Petur Hans A. Joensen*



*Nú korona er um at vera hasað av, eru hátíðarhaldini á Vinnuháskúlanum í sambandi við próvtøkurnar hjá maskinmeistarum og navigatørum farin at líkjast sær sjálvum aftur, og tað hoyrdist aftur á felagssanginum*



*Símun Poulsen, stjóri á Vinnuháskúlanum, beyð vælkomin*














KJ

Heildarveitari til vinnuna

KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastu til alivinnuna, skipaflotan, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna.

Set teg í samband við okkum í Havn ella á Kambsdali

ring 40 70 00

# Formaðurin brúkti søguna at lýsa fakið

**Í síni røðu hugleiddi Ólavur Gunnarsson um søguna frá teimum fyrstu glintandi motorunum til hátøknina í dag, sum gevur maskinmeistarunum so fjølbroyttar starvsmøguleikar**

Ingolf S. Olsen, PRESS

Sum siðvenja er, helt formaðurin í Maskinmeistarafelagnum røðu í sambandi við prógvhandanina 21. januar.

At lýsa fakið og útbúgvingina og nógvu møguleikarnar nú og fram eftir, tók hann støði í søguligu gongdini.

Niðan fyri prenta vit brot úr hugleiðingunum hjá formanninum og hansara heilsan til nýklaktu maskinmeistararnar.

**Nógv glint, lítil ferð**
Tað var longu fyrst í farnu øld, at teir fyrstu motorarnir fóru at glinta í Føroyum. Mangan var tó talan um nógv glint, men lítla ferð. Í fyrstu syftu var talan um útróðrarbátar, sum soleiðis fingu navnið motorbátar.

Hesin sokallaði motorurin var eitt nýtt og ókent tól fyri føroyingin, og tað gekk verri enn so altíð so væl at fáa hann at makka rætt. Tí gjørdist skjótt neyðugt at syrgja fyri, at menn fingu møguleika at nema sær kunnleika í at passa motorar.

Fyrsta skeiðið í motorlæru varð sostatt sett á stovn í Føroyum í 1912. Tað var danin Christian Frederik Sørensen, ið



*Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, helt røðu fyri nýklaktu meistarunum, sum siðvenja er*

*Mynd: Maria Lava Jacobsen, Vinnuháskúlin*

var maskinmeistari á Beskytteren, sum stóð fyri frálæruni. Tó var talan um stokkuta tíð, tí frálæran bleiv steðgað í 1914, tá ið Fyrri Heimsbardagi brast á.

Tað var ikki fyrr enn í 1929, at útbúgvingin bleiv uppafturtikin av Fjerbæk Petersen í sambandi við táverandi navigasjónsskúlan.

**Motorurin bakkaði**

Nú vóru eisini sluppirnar byrjaðar at fáa motorar, og hóast maskinorkan ikki var ovurhonds, hon lá um einar 30 hestar, so var neyðugt, at menn fingu førleika at passa motorarnar.

Bara fyri at lýsa avmarkaðu vitanina um motorar – og ikki minst hvussu lítla orku hesir fyrstu motorarnir høvdu – so hoyrdi eg um eina slupp, sum á heimferð undan Íslandi setti øll segl til fyri at koma heim so skjótt sum gjørligt, og sjálvandi bleiv nýggja undurverkið, motorurin, eisini koblaður í. Komnir á føroyska vág, blivu seglini strikað, tí nú skuldi siglast við motorinum seinasta strekkið inn at bryggjuni. Men ólukkutíð fór skipið eftir hæli. Teir høvdu bakkað við motorinum allan vegin heim undan Íslandi.

**Á hægsta stigi**

Motorskúlin helt so fram til 1943, tá ið Maskinistskúlin bleiv stovnaður. Við hesum skúlanum bar til at taka fyrsta part av maskinmeistaraútbúgvingini her á landi, men neyðugt var at fara av landinum, um farast skuldi víðari. Fyri tað mesta varð farið til Danmarkar, har nógvir føroyngar longu høvdu nomið sær hesa útbúgvingina.

Tað er nógv vatn runnið í ánni síðani, og nú hava vit longu í nógv áratíggju kunna tikið hesa framúrskarandi útbúgvingina, maskinmeistaraútbúgvingina, her á landi, og hava tit tikið eina dagførda útbúgving, sum fult út er á tí stigi, sum dagsins samfelag krevur.

**Nógvir møguleikar**

Jú, tað er heilt víst, at tit hava nomið tykkum eina útbúgving, har starvsmøguleikarnir ikki tróta.

Tað ber til at bjóða seg fram til alskyns størv, bæði á sjógvi og landi, nær sum fjar.

Tey mest siðbundnu eru størvini á sjónum, bæði her heima og uttanlands, har okkara maskinmeistarar eru millum teir best umtóktu og sostatt eru at finna allastaðni; tað veri seg á boripallum, frálandaskipum, handilsskipum og fiskiskipum, og eru teir frálíkir ambassadørar fyri okkara útbúgving og ikki minst fyri okkara land.

Á landi eru maskinmeistarar eisini at finna sum lyklapersónar í fleiri av grundfunksjónunum, sum skulu til fyri at hava eitt nútímans samfelag koyrandi. Eitt nú eru eir longu at finna á orkuverkum, brennistøðum, vatnverkum, í leiðandi funksjónum innan trygd, eftirlit, útbúgving, heilsu og infrakervi umframt á vinnuvirkjum.

Men tað stinga seg alsamt fleiri starvsøki upp í samsvari við, at samfelagið verður útbygt við størri vinnueindum og bygningum annars, har holl teknisk vitan krevst fyri at standa fyri hesum partinum, bæði við planlegging, í byggifasu og aftaná við rakstri og viðlíkahaldi av tekniska útbúnaðinum. Og til hesar uppgávur er maskinmeistarin tað upplagda valið.

Eisini tá talan er um grønu umleggingina, eru tað maskinmeistarar, sum standa í fremstu røð við tí vitan og førleika, sum krevst til eina slíka umlegging.

Umframt allar hesar spennandi starvsmøguleikarnar, gevur maskinmeistaraútbúgvingin teimum, sum veruliga hava fingið smakkin fyri lesnaði, nú eisini møguleika at lesa víðari til bachelor í maskinfrøði.

**Gevið tykkum stundir**

Sostatt hava tit nomið tykkum eina útbúgving sum avgjørt peikar beint frameftir, har bæði starvs- og og útbúgvingarmøguleikar eru í eini rúkandi menning, og gevur hettar frælsi at velja eina leið, fyri síðan seinni at kunna broyta kós og royna seg við heilt øðrum og spennandi avbjóðingum.

Eitt er útbúgving, annað er tað veruliga lívið við øllum sum har til hoyrir. Tit hava við hesum próvnum fingið teoriina uppá pláss, og nú skal tað arbeiðast við tí praktiska partinum.

Brályndi er eitt sum eyðkennir yngra fólkið, tí vilja tey heldur upp á tindin í dag enn í morgin. Sjálvandi er hámarksferðin sett samsvarandi tí, sum útbúgving, siglingstíð og annað avmarkar hana. Men er tað so umráðandi at røkka tindininum við absoluttu hámarksferðini?

Um eg skal geva tykkum eini góð ráð, so skulu tey vera, at tit geva tykkum stundir at dvølja við avbjóðingina, so at tit altíð eru væl ílatnir at taka næsta stigið upp eftir stiganum.

**Fakfelagssinni**

Eisini vil eg heita á tykkum um ongantíð at gerast ov hástórir og altíð at fara við fólki, soleiðis sum tit sjálvir vilja verða viðfarnir. Verið heldur ikki bangnir at býta út av tykkara vitan, vísið format við at bjóða tykkum fram og eisini við at tora at lova øðrum framat, tá ið loysnir skulu finnast.

Í tykkara føri er tað hurðin inn á tann stóra pallin, sum nú stendur klár at lata upp framman fyri tykkum.

Eg fari at heita á tykkum altíð at hava samhaldsfesti og fakfelagssinni við tykkum á arbeiðsleiðini. Tá tað er viðrák á arbeiðsleiðini, er lagamanni at klára skerini, men hettar kann so skjótt broytast til mótgongd, sum kann vera sera trupul at handfara sjálvur. Tá er gott at hava ein góðan bakk aftanfyri seg, sum stendur klárur at traðka til og taka sløgini.

## Aðalfundurin:

# John gevst – aðrir bjóða seg fram



*John Højsted hevur sitið í nevndini í 12 ár, men nú hevur hann fylt 67 og hevur boðað frá, at hann tekur ikki við afturvali. Myndi er frá aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum í mai 2020*

*Mynd: Ingolf S. Olsen*

**Tað verða í hvussu er trý valevni til teir tveir nevndarsessirnar, ið eru upp á val í Maskinmeistarafelagnum. Møguleiki er eisini at bjóða seg fram á sjálvum aðalfundinum**

Ingolf S. Olsen, PRESS

Tað verður stríðsval til nevndina í Maskinmeistarafelagnum á aðalfundinum hesa ferð. Tað er greitt, nú trý valevni hava boðað frá uppstilling áðrenn aðalfundin. Tað ber eisini til at stilla upp á sjálvum aðalfundinum.

Tað eru tveir sessir, ið skulu mannast, og John Højsted, sum í løtuni eigur annan, hevur boðað frá, at hann ikki stillar upp aftur.

John Højsted, ið er maskinmeistari hjá SEV á Sundi, fylti 67 her fyri.

– Eg havi nátt pensjónsaldur, og eg haldi, at aðrir maskinmeistarar har, sum eg arbeiði, hava hug at stilla upp. So eg føli tað púra náttúrligt at gevast

nú, og vit seta yngri kreftir við, sigur hann.

John Højsted bleiv valdur í nevndina í Maskinmeistarafelagnum í 2010 og hevur sostatt havt sæti í 12 ár. Tó at hann nú fer úr nevndini, sigur hann ikki farvæl við arbeiðsmarknaðin beinanvegin.

– Vit kunnu halda fram, til vit eru 70, og eg havi ikki tikið avgerð um, akkurát nær eg gevist. Fyribils havi eg so hug at halda fram, men eg eri tó farin eitt sindur niður í tíð – niður í trý kvart tíð, greiðir John Højsted frá.

Freistin at stilla upp áðrenn aðalfundin var úti 15. desember, og tá høvdu Rógvi K. Hansen og Ólavur J. Østerø boðað frá uppstilling. Teir arbeiða báðir hjá SEV, ávikavist á Sundi og í høvuðs-kontrollrúminum við Landavegin í Havn. Umframt teir báðar hevur Jóhan Mørkøre, ið er hin nevndarlimurin, sum er upp á val, boðað frá, at hann tekur við afturvali. Jóhan Mørkøre arbeiðir á Tavuni í Leirvík.

Tískil verða í hvussu er trý valevni til teir báðarnevndarsessirnar, men tey kunnu saktans gerast fleiri, tí til ber eisini at stilla upp á sjálvum aðalfundinum.

Aðalfundin hjá Maskinmeistara-felagnum verður á Hotel Hafnia leygardagin 19. mars klokkan 14, og skráin er henda sambært lógum felagsins:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins
3. Framløga av roknskapi til góðkenningar
4. Uppskot um lógarbroytingar
5. Val av nevndarlimum og tiltakslimum
6. Ásetan av limagjøldum
7. Velja skrásettan grannskoðara
8. Ymiskt

# Ein veruligur aðalfundur

**Korona hevur tey seinastu tvey árini forkomið tí gamla hugnanum, ið hoyrir aðal-fundum til, men tað verður afturlønt í ár. Sámal Ravnsfjall og Elisa Vang fara at undirhalda**

Ingolf S. Olsen, PRESS



Aðalfundurin hjá Maskinmeistara-felagnum verður á Parnassinum á Hotel Hafnia leygardagin 19. mars klokkan 14, og hesa ferð fáa limirnir ein rættan aðalfund við øllum, ið hoyrir einum slíkum til.

Meðan korona hevur leikað á, hava aðalfundirnir hjá Maskinmeistara-felagnum, eins og allar aðrar fólka-samkomur í landinum, verið ógvuliga avmarkaðir, tá tað um hugnaliga samveru ræður. Teir hava bert kunnað tikið hond um tað mest neyðturviliga.

Men hetta verður afturlønt í ár, nú farsóttin er hasað av, og nógvu og strongu tilmælini eru sett úr gildi.

Aftaná tann formliga partin av aðal-fundinum bjóðar Maskinmeistara-felagið tískil hesa ferð bæði døgurða við tírætta matskrá og tilhoyrandi drykkjuvørum, og undir borðhaldinum fer trubadururin Sámal Ravnsfjall at syngja, og skemtarin Elisa Vang fer at undirhalda.


KANSKA
HAVA VIT
JÚST EIN BIL
TIL TÍN
farsølan
Tel. 50 20 22
www.farsolan.fo


www.mest.fo
MEST
SHIPYARD
EYKALUTIR
24/7 TÆNASTA – RING +298 79 11 00
Lætt at bíleggja umvegis telefon ella teldupost
24/7 tænasta
Størsta og besta goymsla í landinum
SØLUBÚÐ | SHOP
Sølubúð/goymsla í Havn, Runavík og á Skála
Vit koyra kring alt landið
Álítandi tænasta
MEST P/F · J.C. Svabosgøta 31 · P.O. BOX 65 · FO-110 Tórshavn · tel: +298 301100 · sales@mest.fo

www.cig.fo



Norðhavnin
Postsmoga 329
Fo-726 Ánirnar
Føroyar

Tel. +298 617000
T-post: cig@cig.fo

fram á leið ...

# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**4. november 2021**
Á NMF-fundi við norðurlensku maskinmeistarafeløgini - í Reykjavík.

**11. november 2021**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**15. november 2021**
Fyrireikingarfundur við SÓKN advokatar um mál, sum skal leggjast fyri Fasta Gerðarrættin.

**16. november 2021**
Nevndarfundur í P/F Fakfelag. Fundurin varð hildin í hølunum hjá Samverk.

**19. november 2021**
Fundur í Maritima Útbúgvingarráð-num. Fundurin varð hildin á Brúnni í Vinnuháskúlanum.

**25. november 2021**
Fundur við umboð fyri Reiðarí fyri Handilsskip.

**29. november 2021**
Fakfelagsfundur um støðuna hjá flogskiparum, sum ikki fingu starv í boði aftur. Fundurin varð hildin í hølunum hjá Heilsuhjálparafelagnum.

**3. desember 2021**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Á skrá vóru 7 mál til støðutakan umframt kunning um 9 onnur viðurskifti.

**10. desember 2021**
Fundur við umboð fyri MEST. Fundurin varð hildin á skrivstovu felagsins.

**13. desember 2021**
Fundur við Føroya Reiðarafelag .

**13. desember 2021**
Fundur í Umsitingarbólkinum undir Fiskimálaráðnum um ásetan av fiskidøgum fyri komandi árið.

**15. desember 2021**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum fyri fiskimenn.

**22. desember 2021**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Á skrá vóru 2 mál til støðutakan umframt kunning um 9 onnur viðurskifti.

**22. desember 2021**
Blaðfundur saman við Press á skrivstovu felagsins.

**6. januar 2022**
Fundur um- og undirskrivan av seravtalu fyri maskinmanning á sleiparum hjá MEST.

**20. januar 2022**
Fundur um ymisk viðurskifti á Vørn. Fundurin var á skrivstovuni hjá Vørn.

**21. januar 2022**
Próvhandan á Vinnuháskúlanum, har 11 maskinmeistarar fingu prógv handa.

**24. januar 2022**
Fyrireikingarfundur til Sjóvinnuforum ráðstevnuna. Fundurin var hildin í hølum hjá Sjóvinnustýrinum.

**4. februar 2022**
Fundur við formenninar í hinum manningarfeløgunum, har ymisk relevant viðurskifti av felags áhuga vórðu umrødd.

**4. februar 2022**
Nevndarfundur á skrivstovu felagsins. Á skrá vóru 5 mál til støðutakan umframt kunning um 14 onnur viðurskifti.




| Navn | Føðingardagur | Bygd/býur | Aldur |
|---|---|---|---|
| Tummas Thomsen | 20/4-1942 | Gøta | 80 ár |
| Viggo Christiansen | 29/9-1951 | Tórshavn | 70 ár |
| Kristian Andreasen | 9/3-1952 | Klaksvík | 70 ár |
| Kristian Dalsenni | 4/4-1952 | Klaksvík | 70 ár |
| Martin Sonny Frederiksen | 15/1-1962 | Sandavágur | 60 ár |
| Johannes Djurhuus Johannesen | 7/2-1962 | Argir | 60 ár |
| Borgar Biskopstø | 19/2-1962 | Klaksvík | 60 ár |
| Jacob Vilhelm | 8/3-1962 | Tórshavn | 60 ár |
| Høgni Sámal Joensen | 5/4-1962 | Skáli | 60 ár |
| Jóannes Joensen | 5/4-1962 | Tórshavn | 60 ár |
| Atli Liliendahl Hansen | 29/4-1962 | Hoyvík | 60 ár |
| John Erik Hansen | 28/2-1972 | Tórshavn | 50 ár |
| Magnus Winther | 21/3-1972 | Vágur | 50 ár |
| Zacharias S. Müller | 7/1-1982 | Porkeri | 40 ár |
| Johan Falkvard Clementsen | 29/1-1982 | Sandur | 40 ár |
| Ásmundur úr Hvalvík | 3/2-1982 | Klaksvík | 40 ár |
| Jóhan Berg | 19/3-1982 | Kaksvík | 40 ár |
| Justi Hentze | 3/1-1992 | Leynar | 30 ár |
| Bjarni Hentze | 21/1-1992 | Vedbæk | 30 ár |
| Vilhelm Gustav Hentze | 10/2-1992 | Tórshavn | 30 ár |
| Helgi Samson | 12/3-1992 | Viðareiði | 30 ár |
| Regin Lindenskov Hansen | 17/4-1992 | Tórshavn | 30 ár |



**Nýggjur orkuportalur hjá SEV**

# Fylg við

**Við orkuportalinum Mítt SEV fært tú neyvt fylgt við elnýtsluni. Eisini fært tú skjótt og greitt yvirlit yvir fíggjarstøðuna v.m.**

## Fylg við nýtsluni

Á nýggja orkuportalinum sært tú, hvussu nógv tit hava brúkt seinasta samdøgrið, vikuna, mánaðin ella árið.

## Samanber tíðarskeið

Brúka tit meira ella minni enn í fjør? Við orkuportalinum ber til at samanbera tíðarskeið. T.d. nýtsluna í mun til sama tíðarskeið árið fyri.

## Hvussu grøn eru tit?

Til ber eisini at síggja, hvussu stórur partur av orkunýtsluni er grøn orka. Jú grønari, jú betri.

## Yvirlit yvir fleiri eindir

Hava tit fleiri málarar, ber til at fáa greitt yvirlit yvir hvørja eind sær, bólka málararnar og geva teimum nøvn. Til ber at snikka sítt egna yvirlit eftir tørvi.

## Ávaring um høga nýtslu

Skipanin hevur boðtænastu, sum sendir tær kunning um nýtslan fer upp um ella niður um ásett mark.

SANSIR

**Á sev.fo sært tú, hvussu tú ritar inn.**

SEV